# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Framman fyri okkum lá eitt barn við hjartanum uttan á bringuni*
*(Elliot Rosenkranz, hjartaskurðlækni)*

# Føddur við hjartanum uttaná

**Naseem Hasni varð føddur við ectopia cordis, sum ger, at hjartað veksur uttan á bringuni**



*Naasim Hasni varð føddur við hjartanum uttan á bringuni*

Síðst í september kendi tann 33 ára gamla Michelle Hasni á sær, at tað ruggaði ikki rætt við barninum, sum hon gekk við. Hon fór til læknan, og myndir av fostrinum vístu, at barnið hevði ectopia cordis. Hetta er eitt sjáldsamt brek, sum hevur við sær, at hjartað veksur uttan á bringuni.

Læknarnir í Miami, har Mihelle Hasni býr, gjørdu alt fyri eitt av at taka barnið við keisaraskurði.

– Framman fyri okkum høvdu vit eitt barn við hjartanum uttan á bringuni. Tað slóð og punpaði og sá út til at virka væl, sigur hjartaskurðlæknin Elliot Rosenkranz við AP-tíðindastovuna.

Læknarnir gjørdu alt fyei eitt av at leggja tann lítla drongin undir skurð, og skurðviðgerðin eydnaðist so væl, at sambært Elliot Rosenkranz sleppur Naasim helst heim til foreldrini at halda jól.

Læknarnir siga, at Naseem skal leggjast undir skurð fleiri ferðir afturat, men teir halda, at hann kann fáa eitt púra vanligt lív.

Sambært AP hendir tað sera sjáldan, at børn verða fødd við ectopia cordis. Í flestu førum doyggja børnini longu í móðurlívi, og tey flestu, sum verða fødd á lívi, doyggja undir skurðviðgerðini ella beint aftaná.

So tann lítli Naasim er helst ein av teimum fáu hepnu.

# Finskar krígsmyndir fjaldar í 60 ár

**Í meiri enn 60 ár hevur finska hervaldið fjalt myndir, sum myndamenn tóku í teimum báðum kríggjunum millum Finnland og Sovjetsamveldið**



*Sovjetsku hermenninir gjørdu seg ofta inn á finskar kvinnur og børn teirra. Hesar báðar genturnar vórðu skotnar í juli í 1944*

Finnlendingar kunnu nú við egnum eygum síggja ræðuleikarnar frá teimum báðum ferðunum, Finnland var í kríggi við Sovjetsamveldið. Í meiri enn 60 ár hava myndir hjá krígsmyndamonnum ligið væl fjaldar í einari goymslu hjá hervaldinum, men nú loyvir lógin ikki hervaldinum at fjala tær longur. Teir seinastu dagarnar hevur hervaldið almannakunngjørt meiri enn 300 myndir, og tær siga frá einum óhugnaligum tíðarskeiði í landsins søgu.

Søgufólk hava leingi spurt, hví tað almenna Finnland hevur dult ræðuleikarnar, sum finskir hermenn framdu, og hví teir hava roynt at dylja sovjetska ágangin ímóti finska sivilfólkinum. Yvirhøvur hava finnlendingar verið ógvuliga tigandi um tað, sum veruliga hendi í krígsárunum, men myndirnar, sum nú eru almannakunngjørdar, dylja einki. Tær vísa finskar hermenn skjóta landsmenn, sum vóru lagdir undir illgruna fyri at hjálpa fíggindanum, og tær vísa sovjetska ágangin ímóti finska sivilfólkinum.

– Myndirnar siga ikki frá nøkrum, sum vit ikki hava vitað, men tær kunnu vera gagnligar fyri tað yngra ættarliðið, sum hevur eina hetjukenda uppfatan av krígnum, sigur professarin Seppo Hentila.

## STUTT SAGT

### Aftur størstur

Í Noregier Arbeiðaraflokkurin hjá Jens Stoltenberg, forsætisráðharra aftur landsins størsti eftir at hava ligið aftan fyri Framburðsflokkin ta seinastu tíðina. Í einari nýggjari meiningakanning fær Arbeiðaraflokkurin stuðul frá 28,6 prosentum av teimum spurdu, meðan Framburðsflokkurin liggur eitt vet aftanfyri við 27,7 prosentum. Hjá Arbeiðaraflokkinum er talan um eina framgongd upp á 1,7 prosentstig samanborið við seinastu kanning, samtíðis sum Framburðsflokkurin hevur mist heili fýra prosentstig. Tað er langt niður í næsta flokk, sum er Høgri, ið fær 15 prosent.

### Upptøka horvin

Ein sjónbandsupptøka, sum kanska kundi loyst gátuna um, hví ferjan Estonia sakk, er horvin úr goymsluni hjá svenska sjóferðslustýrinum. Estonia sakk í illveðri í Eystrasalti á veg úr Tallin í Estlandi til Stockholm tann 28. desember í 1994. Bara 137 av teimum 892, sum vóru við, vórðu bjargað. Sjónbandið, sum nú er horvið, bleiv upptikið við einum kavbáti í 1996. Hetta er aðru ferð, at eitt týðandi sjónband er horvið í sjóferðslustýrinum, og svenska trygdarløgreglan kannar nú umstøðurnar.

### Funnin deyðir

Løgreglan í Moskva hevur funnið líkini av fimm monnum í útjaðaranum av býnum, og sambært løgregluni er eingin ivi um, at menninir vórðu myrdir gjáranáttina. Talan er tó ikki um ránsmorð, tí teir fimm vóru heimleysir. Ein kvinna var saman við monnunum, og hon varð flutt á sjúkrahús við skaða í høvdinum. Løgreglan fekk boð um líkini og kvinnuna, eftir at fólk høvdu funnið tey tætt við eina vatnleiðing, skrivar AP.